## 4. VÍKINGUR

*Lag: E. H. Korafdeling 11. M. A. 588. G-h. Orð: tobbi j-.*

Frá landnámi var greitt, at fólkið treivst um hesa leið,
á útróðri, í búnaði frá bergi syfti seið.
Bygdir víðkast, fólkið økist, savning mergur er,
tá kappast skal í báti, bólti, felin øllum ber.

Fram í broddin allir víkingar á ferð,
nú!, fylkist um tað liðið, sum vár eygnasteinur er.
Við treysti, snildi, stríði og við førleika gerst alt,
á leikvøllum er Víkingur nú jarðarinnar salt.

Tá gøtumenn og leirvíkingar tóku dystin upp,
stóð guvan frá, tá tikið varð um herðablað og hupp.
Nú berjast allir saman, allir hava sama mál,
bert oddurin kann nøkta eina tysta felagssál.

Bræðing kom á pannu, lógvar saman taka tveir,
á evsta sáttarfundi kempur hamin tveita fleir.
Hallgrímur og Kalli á parnassos skekla fast,
tað djarva felagsstev, sum nú úr øllum heimi sæst.

Fyrsti steypur vunnin var, um ólavsvøkutíð,
ja, ja, nú ræður um at liggja broddi fylking í.
Eitt annað pláss er aldri annað enn eitt neyðarstað,
hvør blóðsdropi skal kóka okkum fram í fremsta vað.